# ScandiCamp 2009

*Summarlega í frælsum ítróttum fyri 18-25 ára gomul, 28 juni – 1 juli*

**Hvat?**
ScandiCamp Stenungsund verður fyriskipað av ungdómsráðunum í svenska, norska og danska frælsasambandinum og er fyri 18-25 ára gamlar frælsarar úr Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum. Á skránni allar dagarnar verða frælsavenjing við dugnaligum leiðarum úr luttakandi londunum, toymisbyggjan, sosialt virksemi og fyrislestrar.

**Nær?**
Sunnudagin 28. juni – mikudagin 1. juli 2009.

**Hvar?**
Í Stenungsund sum er uml. 50 km. norðan fyri Göteborg. Venjingin fer fram á Nösnäsvallen, har SM, svensku meistaraheitini, fyri ung vóru í 2007; og vit búgva marglætiskent á Hotell Stenungsbaden.

**Hvussu?**
Legan byrja kvøldið eftir Världsungdomsspelen (Heimsungdómsleikirnar). Sunnudag seinnapart og út á kvøldið verða bussar at fara úr Göteborg til Stenungsunds. Teir koyra frá Göteborg Centralstation og felags ferðing hagar úr Danmark verður samskipað av DAF. Meir kunning um alt hetta seinni.

**Tilmelding**
Tú meldar teg til leguna á tilmeldingarskjalinum á
http://response.questback.com/idrott/scandicamp09/
í seinasta lagi 27. mai 2009. GG! Tilmelding er bindandi.

Leguútreiðslurnar eru 1.700 DKK. Eftir tilmeldingarfreistina fært tú innkrevjingarskjal frá DAF..

Fylg javnan dagføringum um leguna á www.dansk-atletik.dk, www.atlet-forum.dk ella leita upp "ScandiCamp" á www.facebook.com. Setið tykkum annars í samband við Dansk Atletik Forbund, daf@dansk-atletik.dk / kirse@dansk-atletik.dk ella ring á tlf. 00298

43262306 fyri at fáa meir at vita.

*Lat ikki ScandiCamp 2009 gleppa tær av hondum!*